# ÚTBÚGVINGAR

# 2024



- Bygging
- EL og KT
- Flutningsfør
- Grafikkur og miðlan
- Heilsa, umsorgan og námsfrøði
- Miðnámsútbúgvingar
- Skrivstova, handil og tænasta
- Matur
- Maskin og framleiðsla
- Uppliving og tænasta
- Tilfeingi og náttúra

# AT VELJA ÚTBÚGVING OG FÁA VEGLEIÐING

Í hesum faldara verður kunnað um tann partin av føroysku útbúgvingunum, sum fevna um yrkisútbúgvingar, miðnám og aðrar útbúgvingar á miðnámsstigi. Tú skalt hava eitt níggjunda- ella 10.-floksprógv fyri at søkja inn á hesar útbúgvingar.

Við einari gymnasialari miðnámsútbúgving, ið vanliga tekur trý ár, útvegar tú tær førleikar til framhaldslestur á lærustovnum í Føroyum ella uttanlands.

Við einari yrkisútbúgving gert tú teg til reiðar at fara út á arbeiðsmarknaðin at arbeiða sum faklærd/ur. Tú hevur eisini møguleika til seinni at fara undir framhaldslestur.

Útbúgvingartilboðini eru nógv og spennandi, og tí kann tað vera torført at taka avgerð um at velja røttu útbúgvingina.

Vegleiðing er tí ein týdningarmikil partur av tí at velja útbúgving. Á skúlunum kring landið eru dugnaligir vegleiðarar, ið eru til reiðar at svara spurningum og vegleiða teg, um okkurt er um útbúgvingarnar, ið tú vilt hava meira at vita um.

Ert tú í iva um, hvønn skúla tú skalt seta teg í samband við, so er Vegleiðingarstovan tað rætta staðið, at venda sær til.

Ynskir tú tær eina yrkisútbúgving, kanst tú venda tær beinleiðis til eitt lærupláss ella til Yrkisdepilin at fáa kunning um læringina og lívið sum lærlingur í teirra fyritøku. Á heimasíðuni hjá Yrkisdeplinum er yvirlit yvir allar tær føroysku fyritøkurnar, kring alt landið, sum eru góðkendar at taka lærlingar.

Nógv tann størsti parturin av einari yrkisútbúgving fer fram sum læra á einum arbeiðsplássi, og hevur vinnan tí ein týdningarmiklan leiklut í okkara útbúgvingarskipan.

Vónandi kann hesin kunningarfaldari vera við til at vekja tín áhuga at velja eina útbúgving, sum tú ynskir skal vera grundarlagið undir tínari starvsleið frameftir.

# SKÚLARNIR

**Miðnám í Vestmanna**
Fjarðarvegur 4, Vestmanna
miv.fo
424 573

**Glasir**
Janusargøta 3, Tórshavn
glasir.fo
616 600

**Musikkskúlin**
Hoyvíksvegur 72, Tórshavn
musikkskulin.fo
216 462



**TSK**
Mýrivegur 2, Klaksvík
tsk.fo
456 311

**Sjónám**
Faktorvegur 14, Klaksvík
sjonam.fo
665 888

**Miðnám á Kambsdali**
Dalsvegur 1, Fuglafjørður
kambsdalur.fo
610 800

**Heilsuskúli Føroya**
Grønudalur 2, Porkeri
heilsuskulin.fo
614 210

**Miðnám í Suðuroy**
Grønudalur 2, Porkeri
midnam.fo
614 201

** Nakrar av yrkisútbúgvingunum hava danska skúlagongd. Hetta sæst á síðunum, har einstøku yrkisútbúgvingarnar verða nærri lýstar.*

## Vegleiðingarstovan

Tú ert altíð væl komin at støkka inn á gólvið at tosa um útbúgvingar- og starvsmøguleikar, við øllum tí, sum tað inniber. Eisini ber til at ringja 200910 ella senda teldupost: vegleiding@uvs.fo

Allar útbúgvingar eru umboðaðar í Vegleiðingarstovuni, og vit vita, hvønn vit skulu seta okkum í samband við, fyri at fáa besta svarið upp á spurningar og ivamál.

**www.vegleiding.fo**




**Hoyvíksvegur 72,
Tórshavn**

Bygging

EL og KT

Flutningsfør

Grafikkur og miðlan

Heilsa, umsorgan og námsfrøði

Miðnámsútbúgvingar

Skrivstova, handil og tænasta

Matur

Maskin og framleiðsla

Uppliving og tænasta

Tilfeingi og náttúra

# YRKISÚTBÚGVINGAR

Á næstu síðunum ber til at síggja tær 60+ yrkisútbúgvingarnar, sum tú kanst læra til í Føroyum. 15 av hesum hava skúlagongd í Føroyum, hinar eru við danskari skúlagongd.

Til ber at byrja eina yrkisútbúgving við føroyskari skúlagongd við antin at søkja inn á skúla ella við at byrja í læru á einum arbeiðsplássi. Tó krevst altíð ein lærusáttmáli við ein arbeiðsgevara, fyri at tú kanst gera teg lidna/n og fáa eitt sveinabræv ella lærubræv til eina føroyska yrkisútbúgving.

Byrjar tú yrkisútbúgvingina við lærusáttmála, byrjar tú til arbeiðis tann dagin, sum tú og arbeiðsgevarin semjast um. Tá tú hevur undirskrivað lærusáttmálan og ert byrjað/ur í læru, fært tú løn ígjøgnum alla lærutíðina, eisini í skúlatíðini. Lærlingar fáa skattafrádrátt á 50.000 krónur um árið. Á www.yrkisdepilin.fo sæst eitt yvirlit yvir øll góðkend læripláss.

Byrjar tú eina yrkisútbúgving við føroyskari skúlagongd, við at søkja inn á skúla, fært tú útbúgvingarstuðul í skúlatíðini.

Í einari yrkisútbúgving skiftir tú ímillum at ganga í skúla og at læra á arbeiðsplássinum. Skúlagongdin er umleið 25% av lærutíðini. Yrkisdepilin meldar teg til skúlan og skúlin gevur tær og lærumeistaranum nærri boð um, nær skúlaskeiðini liggja. Føroyskir lærlingar, sum fara til Danmarkar í skúla, búgva vanliga saman við øðrum lærlingum á einum skúlaheimi, sum hoyrir til skúlan.

Hevur tú tikið partar av skúlagongdini, áðrenn tú fert í læru, fært tú skúlatíðina góðskrivaða og lærutíðina stytta. Læran byrjar, tá Yrkisdepilin hevur fingið lærusáttmálan, sum lærlingur og lærumeistari undirskriva. Tað er tí umráðandi, at tú tryggjar tær, at Yrkisdepilin hevur sáttmálan, áðrenn tú byrjar í læru.

www.yrkisdepilin.fo




**Hoydalsvegur 1,**
**Tórshavn**

YRKIS depilin

Um tú hevur spurningar ella ivast, fært tú vegleiðing við at venda tær til Yrkisdepilin. Ring, skriva ella kjatta við okkum: www.yrkisdepilin.fo.

**Í læru á arbeiðsplássi og skúlagongd**

Í lærutíðini verður skift ímillum læru á einum arbeiðsplássi og skúlagongd.

Tað er ymiskt, hvussu nógv skúlaskeið útbúgvingarnar hava, men vanligast er við 3 ella 4 skúlaskeiðum umframt einum sveinaroyndarskeiði.

Til nakrar av yrkisútbúgvingunum við skúlagongd í Føroyum, ber til at søkja beinleiðis inn á skúlan, og taka 1. og 2. skúlaskeið uttan lærusáttmála.

Dømi um býti millum skúlagongd og læru á einum arbeiðsplássi:

- **1. skúlaskeið er 20 vikur**
- **2. skúlaskeið er 10 vikur**
- **3. skúlaskeið er 10 vikur**
- **4. skúlaskeið er 10 vikur**
- **Sveinaroyndarskeið er 5 vikur**

Til arbeiðis · Í skúla · Sveinaroynd

**Yvirlit yvir góðkend lærupláss í Føroyum**

**Yvirlit yvir yrkisútbúgvingar í Føroyum**

Bygging
EL og KT
Flutningsfør
Grafikkur og miðlan
Heilsa, umsorgan og námsfrøði
Miðnámsútbúgvingar
Skrivstova, handil og tænasta
Matur
Maskin og framleiðsla
Uppliving og tænasta
Tilfeingi og náttúra

# BYGGING

## ANLEGSGARTNARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum anlegsgartnari fært tú grundleggjandi frálæru í at gera og røkja eitt nú havar, parkir og kirkjugarðar. Tú lærir um trø, blómur og grøs og um hvussu tey kunnu setast saman. Partar av arbeiðinum eru við maskinu, aðrir við hond.

**SKANNA** OG
LES MEIRA UM
ÚTBÚGVINGINA

# SKRIVSTOVA, HANDIL OG TÆNASTA

## ADVOKATSKRIVARI (EUX)

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Útbúgvingin til advokatskrivara er ein skrivstovuútbúgving við sergrein sum advokatskrivari.

Skúlagongdin er í Danmark og er skipað sum ein EUX-útbúgving, ið er samansett av einari gymnasialari miðnámsútbúgving á 2 ár og einari yrkisútbúgving. Sum advokatskrivari lærir tú um rættarmál, umframt at gera skjøl sum t.d. stevningar og testamenti. Ein skrivstovuútbúgving gevur tær grundleggjandi vitan um fyrisiting og búskap.

# ANLEGSSMIÐUR

LONGD **3 ÁR 6–12 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Útbúgvingin gevur tær grundleggjandi vitan innan bygging av vegum, brúgvum, skrivstovubygningum, íbúðarøkjum, torgum og økjum. Tú lærir at arbeiða við ymiskum tilfari eftir plantekningum og útrokningum, og tú lærir at arbeiða saman við øðrum fakbólkum.

Ein anlegssmiður (eisini nevnt verklagssmiður) syrgir fyri, at alt er klárt til bygging. Jørðin skal gravast, flytast og slættast, og tað skal leggjast dren og grund.

# BYGGISMIÐUR

LONGD **3 ÁR 6–12 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Útbúgvingin gevur tær grundleggjandi vitan innan bygging av vegum, brúgvum, skrivstovubygningum, íbúðarøkjum, torgum og økjum.
Tú lærir at arbeiða við ymiskum tilfari eftir plantekningum og útrokningum, og tú lærir at arbeiða saman við øðrum fakbólkum.

Ein byggismiður arbeiðir mest við bygginini, ið er omaná jørðini. Til hetta krevst vitan um tilfarið, sum skal brúkast til kjallarar, trappur, múrar, vegbrýr, motorvegir og tílíkt.



# BLÓMUBINDARI

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Útbúgvingin til blómubindara er ein útbúgving innan smásølu við sergrein innan blómubinding. Tú lærir grundleggjandi vitan um vøru, sølu og kundatænastu í einum handli.

# HANDILSFÓLK

## VIÐ SERGREIN OG PROFIL

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Tú lærir, hvussu søla fer fram millum fyritøkur, og hvussu søla av vørum og tænastum kann gerast, so at tú gevur fyritøkuni vinning. Tú lærir at heinta inn tilboð, samanbera prísir og góðsku, arbeiða við logistikki, umframt at keypa inn vøru í hóskandi mongd.

## BYGNINGS-SNIKKARI

LONGD **3 ÁR 3–9 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum bygningssnikkari fært tú grundleggjandi vitan um trætilfar og útgerð, sum verður brúkt til at programmera, innstilla og góðskutryggja alskyns snikkaramaskinur, og tú lærir at framleiða og montera vindeygu, hurðar, trappur og annað snikkaraverk.

## GÓLVLEGGJARI

LONGD **3 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum gólvleggjari ert tú við til at ráðgeva og meta um prís, góðsku og annað í sambandi við at leggja gólv á.

Tú ert við til at tekna og leggja uppgávur til rættis, og arbeitt verður bæði við amboðum og maskinum.

Uppgávurnar verða javnan loystar saman við øðrum handverkarum, so arbeitt verður bæði sjálvstøðugt og í toymi.

## LOGISTIKK-ATSTØÐINGUR

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Logistikkútbúgvingin er ein handilsútbúgving við sergrein í logistikki.

Tú lærir, hvussu søla av vørum og tænastum og vørugoymsla kunnu rekast sum skynsamast fyri vinning. Tú lærir at heinta inn tilboð, samanbera prísir og góðsku, arbeiða við logistikki, umframt at keypa inn vøru í hóskandi mongd.

Tekur tú hesa útbúgvingina, lærir tú sum oftast hjá einari fyritøku, sum handlar við aðrar fyritøkur.

## SKRIVSTOVUFÓLK

### VIÐ SERGREIN INNAN ALMENNA FYRISITING (EUX)

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Eitt skrivstovufólk innan almenna fyrisiting lærir grundleggjandi um fyrisiting og búskap. Tú lærir um samband við viðskiftafólk og tænastu, hvussu tú arbeiðir við tekstviðgerð, dátugrunnum, rokniarki og øðrum KT-skipanum.

## HÚSASMIÐUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Sum húsasmiður dugir tú kynstrið at smíða hús og bygningar og at gera alskyns timburarbeiði.

Tú lærir at gera útveggir og takkonstruktiónir, at forskalla, klæða, bjálva, leggja gólv og at seta vindeygu og hurðar í, umframta at montera køkar og aðrar lidnar bygningslutir.

"EIN TÝDNINGARMIKIL PARTUR AV ARBEIÐINUM ER AT **RÁÐGEVA** KUNDUM"

## HÚSAVØRÐUR

LONGD **3 ÁR 3 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum húsavørður fært tú grundvitan um hita- og ventilatiónsskipanir og el- og vatnveitingar.

Tú lærir um viðlíkahald, at gera smærri umvælingar og at samstarva við handverkarar í sambandi við størri uppgávur. Tú lærir um skaðameting av bygningum og brynjar teg at vera um brúkarar á staðnum, har tú ert húsavørður.

## SKRIVSTOVUFÓLK

VIÐ SERGREIN Í BÚSKAPI (EUX)

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Við sergrein innan búskap lærir tú at seta upp roknskapir og gera fíggjarætlanir. Tú lærir t.d. at bóka inntøkur, útreiðslur og lønir og at fíggjarstýra virkir.

Ein skrivstovuútbúgving gevur tær grundleggjandi vitan um fyrisiting og búskap.

## SKRIVSTOVUFÓLK

VIÐ SERGREIN INNAN FYRISITING

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Vanlig skrivstovuútbúgving innan fyrisiting kann takast á Glasi. Allar aðrar skrivstovuútbúgvingar krevja danska skúlagongd.

Ein skrivstovuútbúgving gevur tær grundleggjandi vitan um fyrisiting og búskap. Við FHS ella einari gymnasialari útbúgving verður útbúgvingin stytt samsvarandi.

## HVS OG ORKA

LONGD **3 ÁR 9 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Útbúgvingar sum HVS-innleggingartøkningur, HVS- og blikksmiður, HVS-orkuserfrøðingur ella ventilatiónstøkningur.

Útbúgvingin innan HVS og orku gevur tær grundleggjandi vitan um tekniskar installatiónir í privatum heimum og fyritøkum. Alt eftir hvørja sergrein tú velur, fært tú frálæru innan orku, blikksmíð, ventilatión ella installatión.

## MÁLARI

LONGD **3 ÁR 9 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Útbúgvingin gevur tær hollan kunnleika um málarayrkið, og tú arbeiðir bæði á byggiplássum og í sethúsum, inni sum úti. Tú viðgert og málar múr-, træ- og metalflatur. Á skúlanum lærir tú at blanda litir og at mála við ymiskum sløgum av máling.

## SKRIVSTOVUFÓLK

### VIÐ SERGREIN Í ROKNSKAPI OG GRANNSKOÐAN (EUX)

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Við sergrein innan roknskap og grannskoðan lærir tú um tær ymisku roknskaparuppgávurnar og at viðgera roknskapir á ymsum virkjum.

Ein skrivstovuútbúgving gevur tær grundleggjandi vitan um fyrisiting og búskap.

## SKRIVSTOVUFÓLK

### VIÐ SERGREIN Í SPEDITIÓN OG SHIPPING (EUX)

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Tú lærir at leggja til rættis flutning av vøru sjóvegis og loftvegis. Arbeiðið snýr seg í høvuðsheitum um at stýra sambandinum millum shippingfyritøkuna og tær fyritøkur, sum hava tørv á at flyta vøru millum seljara og keypara.

## MASKINSNIKKARI

LONGD **3 ÁR 3–9 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum møbilsnikkari fært tú grundleggjandi vitan um trætilfar og útgerð, lærir at smíða møblar og annað fínari innbúgv, eins og tú lærir at nýta vanligar snikkaramaskinur og fært kunnleika um teldustýrdar skipanir innan sniðgeving og møbilsmíð.

Sum orgulsnikkari fært tú grundleggjandi vitan um m.a. trætilfar, og tú lærir kynstrið at smíða, seta upp, viðlíkahalda og stemma orgul.

## MÚRARI

LONGD
**3 ÁR 5–11 MÐR**
SKÚLAGONGD
**DANMARK**

Tú lærir múrarakunstin og halda viðlíka hús og bygningar, ið eru gjørd úr sementi og steini.

Í skúlanum fært tú innlit í ymisk sløg av tilfari, og hvussu tey skulu nýtast, og tú lærir eisini at lesa arbeiðstekningar. Í lærutíðini sleppur tú at stoypa sokklar og gólv, at arbeiða við taksteinum, at pussa framsíður og at leggja flísar.

## SØLUFÓLK

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Undir útbúgvingini til handilsfólk og sølufólk fært tú frálæru innan tað handilsliga starvsøkið, eitt nú um sølu, vørur, innkeyp og goymslu, og tú lærir eisini um tænastu og samskifti við kundar og veitarar. Við FHS ella einari gymnasialari útbúgving verður útbúgvingin stytt samsvarandi.

## SØLUFÓLK

VIÐ SERGREIN

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Undir útbúgvingini sum sølufólk við sergrein fært tú grundleggjandi frálæru um sølu, vørur og tænastur í handilsvinnuni.

Tú lærir harumframt eitt nú um innkeyp av vøru, at halda skil á goymsluni og at vegleiða kundum.

Við sergreinini er neyvari frálæra um vørur og mannagongdir í viðkomandi sergrein, tú hevur valt.

# EL OG KT

# MATUR

## AUTOMATIKKTØKNINGUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum automatikktøkningur lærir tú um stýrandi skipanir, og tú lærir um el, tøkni og sterkstreymsskipanir. Tú lærir at byggja upp og royna sjálvvirkandi skipanir og at seta maskinur upp til framleiðslur.

"EIN TÝDNINGARMIKIL PARTUR AV ARBEIÐINUM ER AT **RÁÐGEVA** KUNDUM"

## DÁTUTØKNINGUR

LONGD **5 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum dátutøkningur lærir tú um framkomnar skipanir, og tú fært ymiska frálæru, alt eftir um tú velur sergrein innan forritan ella infrastruktur.

Innan forritan lærir tú at sniðgeva og umsita forrit til teldur og fartelefonir, og innan infrastruktur lærir tú at sniðgeva og umsita margfaldar skipanir við innbygdum trygdarloysnum.

EL og KT

Flutningsfør

Grafikkur og miðlan

Heilsa, umsorgan og námsfrøði

Miðnámsútbúgvingar

## BAKARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Útbúgvingin sum bakari gevur tær grundleggjandi vitan um bakstur og baksturrávøru sum heild.

Á donsku skúlunum eru ymiskar sergreinar innan bakarayrkið: bagværker, håndværksbager og detailbager.

## FØÐSLUATSTØÐINGUR

LONGD **2 ÁR 11 MÐR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR OG DANMARK**

Ein føðsluatstøðingur ger heilsugóðan mat á stovnum og í størri køkum. Tú skalt gera mat til nógv fólk, og dentur verður lagdur á, at maturin sær leskiligur út.

Tú fært grundleggjandi vitan um føðslu og matgerð, og tú kemur at luttaka í allari mannagongdini, ið fevnir um matskrá, innkeyp, goymslu, matgerð, borðreiðing og upptak.

Matur

Maskin og framleiðsla

Uppliving og tænasta

Tilfeingi og náttúra

# ELEKTRIKARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Ein elektrikari arbeiðir við el-innleggingum til t.d. sethús, skrivstovur, virki og skip.

Talan kann vera um t.d. ljós, motorar, elektroniskar stýringar til flutningsskipanir og framleiðslueindir. Eisini fæst elektrikarin við fjarskiftis-, dátu- og antennuinnleggingar.

# ELEKTRONIKKFAKTØKNINGUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Undir útbúgvingini sum elektronikkfaktøkningur lærir tú at seta upp og halda við líka t.d. samskiftisútgerð, vakmyndaútgerð og royndarstovuútgerð, umframt elektroniskar skipanir og tól til eitt nú sjúkrahús.

# FØÐSLUHJÁLPARI

LONGD **1 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Ein føðsluhjálpari lærir at gera heilsugóðan mat á eitt nú stovnum og í stórkøkum.

Tú verður við í mannagongdini, ið tryggjar, at maturin er bæði heilsugóður og leskiligur, og tú kemur eisini at fáast við innkeyp, borðreiðing og upprudding.

# GOURMETSLAKTARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Ein gourmetslaktari veit alt um kjøt, og hvussu tað skal handfarast. Á skúlanum lærir tú, hvussu kjøtið í ymiskum djórum er, og hvussu tað skal skerast og goymast fyri at vera fyrsta floks.

Í donsku skúlunum er undirvísingin tillagað eftir teirri sergrein, tú velur.

# KT-SUPPORTARI

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Undir útbúgvingini fært tú vitan um tøknina handan KT-skipanir, og tú fært førleikar at ávirka og menna tøkni. Tú lærir um framkomnar KT-skipanir, og tú fært eitt nú sum uppgávu at halda tær við líka.

# MEDIKOTØKNINGUR

LONGD **5 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Á útbúgvingini sum medikotøkningur lærir tú at installera og halda við líka samskiftis-, vakmynda- og royndarstovuútgerð umframt elektroniskar skipanir og tól til eitt nú sjúkrahús.

# KOKKAHJÁLPARI

LONGD **1 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Sum gastronomhjálpari fært tú ta mest grundleggjandi frálæruna innan matgerð og rávørur.

Eftir lokna útbúgving kanst tú starvast sum gastronomhjálpari í kantinum ella stórkøkum á t.d. stovnum ella virkjum, ella tú kanst lesa víðari innan matyrkið.

# KOKKUR

LONGD **3 ÁR 9 MÐR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Sum kokkur lærir tú alskyns mátar at gera mat og fært innlit í kunstin at handfara rávørurnar, so at maturin skal síggja leskiligur út og smakka væl.

Tú lærir eisini um heilsu og kost, og um hvussu tú hevur fyrilit fyri umhvørvi og burðardygd.

# TILTAKSTØKNINGUR OG AV-TØKNINGUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum tiltakstøkningur ella AV-tøkningur lærir tú at leggja til rættis tann praktiska partin av einum tiltaki, framsýning ella framleiðslu, og tú lærir at brúka útgerð, ið verður brúkt til eitt nú konsertir, festivalar, sjónleikir, messur og aðrar sýningar.

Talan kann vera um alt frá at arbeiða á verkstaði fyri at klárgera pallar, til at handfara framkomnar ljóð- og ljósskipanir undir framførslum.

Tiltakstøkningar og AV-tøkningar arbeiða vanliga sum verkætlanarsett ella í føstum starvi í eitt nú leikhúsum, mentanarhúsum og líknandi, har fingist verður við tiltøk og framsýningar.

# KONDITTARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Í útbúgvingini sum kondittari lærir tú at baka ymisk sløg av køkum, og tú lærir eisini at gera dessertir, ís og marsipan. Tú lærir um ymiskar mannagongdir og at gera skap og prýði burtur úr bakstrinum.

# MEIARISTUR

LONGD **3 ÁR 2 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum meiaristur fært tú grundleggjandi vitan um at gera ymiskan úrdrátt burtur úr mjólk, til dømis smør og ost.

Meiaristar arbeiða sum oftast á stórum mjólkarvirkjum, men tað kann eisini vera í øðrum framleiðslum, eitt nú innan heilivág og ísframleiðslu.

# SKÚLAGONGD Á YRKISSKÚLA




Kelda: yrkisdepilin.fo/hagtoel

## MÓTTØKUFÓLK

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Eitt móttøkufólk tekur ímóti gestum og øðrum kundum á eitt nú hotellum og deplum og tryggjar sær, at teir hava tað gott.

Sum móttøkufólk ert tú verturin á staðnum, og undir útbúgvingini lærir tú, hvussu tú veitir bestu tænastuna og vegleiðingina.

## TÆNARI

LONGD **3 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Ein tænari tryggjar at gestirnir á einari matstovu fáa eina góða uppliving, og undir útbúgvingini lærir tú eitt nú um mat, vín, tænastu og vertskap.

Tú lærir at tosa við kundarnar og viðmæla teimum mat og drekka. Tú lærir eisini at prýða borð og at blanda drykkir.

# FLUTNINGSFØR

# MASKIN OG FRAMLEIÐSLA

## BILLAKKERARI

LONGD **3 ÁR 9 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Ein billakkerari fær grundleggjandi vitan í at umvæla lakk á bilum – eitt nú at spartla, slípa og grunda, áðrenn tað verður sproytimálað.

Størru arbeiðini við máling fara fram í einari kabinu við sproytitøkni, og tær smærru umvælingarnar kunnu eisini verða gjørdar á verkstøðum.

## BILPLÁTUSMIÐUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Undir útbúgvingini til bilplátusmið fært tú grundleggjandi vitan um at umvæla bilskrokkar á persónbilum, vøruvognum, lastbilum og bussum. Tú lærir at bøta um, gera og passa nýggjar plátulutir til akførini.

## BÁTASMIÐUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Tú lærir um tilfar, arbeiðshættir og handaligar snildir, sum hoyra bátasmíðnum til. Tú fært grundleggjandi frálæru í at smíða, umvæla og halda við líka bátar og eisini at sniðgeva, tekna og gera útrokningar til framleiðsluna.

## FÍNSTÁLSMIÐUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Ein fínstálsmiður arbeiðir við stáli, og uppgávurnar kunnu t.d. vera at smíða eitt nú trappur, stigar, lás og portur burtur úr stáli. Undir útbúgvingini fært tú grundleggjandi vitan um at arbeiða við metal.

## BILSMIÐUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Undir útbúgvingini sum bilsmiður fært tú gjøgnum skúlagongd og verkliga læru vitan og førleikar innan eitt nú eftirlit, viðlíkahald og umvæling av persón- og vørubilum undir 3.500 kilo.

## ENTREPRENØR-MASKINMEKANIKARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Tú lærir at eftirhyggja og umvæla maskinur innan byggiyrkið, eitt nú gravimaskinur, rennugravarar og kranar. Umvælingarnar kunnu eitt nú vera skift av motorum, stýriliðum, bremsum og koblingum.

## FÍNSTÁLSMIÐUR

Í RUSTFRÍUM TILFARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR OG DANMARK**

Tú lærir at sveisa, bora, skera og sum heild viðgera rustfrítt tilfar og gera tað til kassar, rørskipanir og annað. Undir útbúgvingini tekur tú eisini prógv í sveising.

## KØLITØKNINGUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Ein kølitøkningur arbeiðir við køliskipanum og luftskiftisskipanum, og undir útbúgvingini lærir tú at seta skipanirnar upp, umvæla tær og halda tær við líka.

Talan er um skipanir heilt frá smáum køliskápum til stórar skipanir í vinnuni.

## FLOGTØKNINGUR

LONGD **4 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum flogtøkningur lærir tú at halda við líka, kanna, umvæla og klárgera flogfør við turbinumotorum og stempulmotorum og tyrlur við turbinumotorum.

## LASTBILMEKANIKARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum lastbilmekanikari lærir tú um akfør, ið eru omanfyri 3.500 kilo, eitt nú lastbilar, bussar, vøruvognar og viðfestisvognar.

Tú lærir um ymisku sløgini av motorum og skipanum í tyngri akførum og at viðlíkahalda hesi.

## MASKINSMIÐUR

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Í maskinsmiðjulæru fært tú grundleggjandi frálæru um maskinur í vinnuni, og tú lærir at forrita, seta upp og dagføra tær.

Undir útbúgvingini lærir tú at gera maskinlutir (dreya og fresa) til eitt nú motorar, pumpur o.a. Harumframt lærir tú grundleggjandi sveising og motorlæru.

Maskinsmiðir starvast ymisk støð, so sum á skipasmiðjum og á verkstøðum innan smiðju- og maskinídnaðin.

## PLASTMAKARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Ein plastmakari skapar fjølmangar lutir úr plastiki, alt frá leikum til stórar vindmylluveingir.

Tú fert at arbeiða nógv við maskinum, sum forma vørurnar, og tú skalt eitt nú fyrireika og halda eyga við arbeiðinum.

# NÝGGIR LÆRUSÁTTMÁLAR **SÍÐAN 2005**




*Ein árgangur í Føroyum er umleið 660 fólk*

Kelda: yrkisdepilin.fo/hagtoel

## RØRSMIÐUR

LONGD **4 ÁR**

SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Rørsmiðir fáast við at tilevna og røkja HVS-stýriskipanir oljuketlar og aðrar orkuskipanir til eitt nú sethús, verksmiðjur og virkir.

Tú fært grundleggjandi frálæru í smiðju- og maskinarbeiði, sum brynjar teg til at virka sum handverkari innan eitt nú jarn og metal.

## RØR- OG BLIKKSMIÐUR

LONGD **4 ÁR**

SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Sum rør-og blikksmiður gert og røkir tú vatnskipanir, hitaskipanir og ventilatiónsinnleggingar í eitt nú sethúsum og virkjum.

Eisini fert tú at seta HVS-stýriskipanir upp og geva vegleiðing, umframt at røkja og umvæla skipanir innan yrkið.

# BEST UMTÓKTU YRKISÚTBÚGVINGARNAR

## KVINNUR ♀

1. **Skrivstovufólk**
2. Sølufólk
3. Hárfríðkari
4. Móttøkufólk
5. Kondittari
6. Handilsfólk
7. Læknaskrivari
8. Tænari
9. Kokkur
10. Húsasmiður

## MENN ♂

1. **Húsasmiður**
2. Maskinsmiður
3. Elektrikari
4. Sølufólk
5. Bilsmiður
6. Kokkur
7. Rørsmiður
8. Handilsfólk
9. Bakari
10. Skrivstovufólk

Kelda: yrkisdepilin.fo/hagtoel

## SEGLMAKARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum seglmakari lærir tú at seyma og umvæla segl, presendingar, dúkar, markisur og annað mangt.

Tú lærir eisini at sniðgeva nýggjar vørur til framleiðsluna.

## SVEISARI

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Ein sveisari arbeiðir við at gera tilskeringar og tilevna rættar-, skráar- og heildarskurð í plátur, rør og tvørskurðir.

Eisini fæst ein sveisari við einfaldar framleiðsluuppgávur, bæði handaligar og við maskinum, og gera skap í plátu-, rør- og stáltvørskurðum.

Aðrar uppgávur eru eitt nú at røkja amboð og viðgera yvirflatur úr metalli og øðrum tilfari, og at leggja til rættis samansettar sveisiuppgávur.

# GRAFIKKUR OG MIÐLAN

# UPPLIVING OG TÆNASTA

# FILMS- OG SJÓNVARPS-FRAMLEIÐSLUTØKNINGUR

LONGD **5 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum films- og sjónvarpsframleiðslutøkningur fæst tú við at framleiða eitt nú film, sjónbond og sjónvarpssendingar, og tú verður við til at fyrireika, taka upp og viðgera framleiðsluna. Tú fært frálæru í at brúka útgerðina til framleiðsluna, og tú fært innlit í eitt nú ljós, ljóð, viðgerð og nýggjastu tøknina.

# FOTOGRAFUR

LONGD **4 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Undir útbúgvingini lærir tú at hugsa, skapa og brúka motiv, ljós og myndaviðgerð.

Tú fært grundleggjandi frálæru í teimum mongu viðurskiftum, sum eru avgerandi fyri ta góðu myndina. Arbeitt verður við allari tilgongdini – frá ætlan til lidna mynd.

# HÁRFRÍÐKARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Útbúgving sum hárfríðkari gevur tær grundleggjandi vitan um at klippa, seta og røkja hár. Eisini lærir tú um hárvørur, og hvussu tær rigga.

Útbúgvingin gevur tær tekniskar, ástøðiligar og almennar førleikar, sum við eftir- og framhaldsútbúgvingum kunnu menna persónligu førleikarnar.

# KOSMETIKARI

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum kosmetikari fæst tú við húð, vakurleika og vælveru, og tú lærir um mannagongdir og vørur innan andlits- og kropsrøkt.

Umframt at gera andlits- og kropsviðgerðir, eitt nú pedicure og manicure, skalt tú eisini vegleiða kundum innan vælveru og røkt.

Kosmetikarar arbeiða gjarna á eitt nú vakurleikastovum, vælverusentrum og á klinikkum.

## GRAFISKUR TØKNINGUR

LONGD **3 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Undir útbúgvingini lærir tú grafisk kynstur og at brúka tilfar og amboð í samband við grafiska arbeiðið. Tú lærir sjálvstøðugt at ráðleggja, seta í verk og halda eftirlit við framleiðsluni av grafiska tilfarinum.

## MIÐLAGRAFIKARI

LONGD **3 ÁR 11 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Ein miðlagrafikari arbeiðir kreativt við teksti og myndum, bæði talgilt og á prenti.

Undir útbúgvingini lærir tú um týdningin av myndum, skapi og litum, og tú lærir at hava eitt tekniskt yvirlit heilt frá hugskoti til lidna framleiðslu. Tú lærir, bæði ástøðiliga og í verki, at loysa arbeiðs-uppgávurnar, sum verða gjørdar á grafiskum verk-støðum, á samskiftisfyritøkum og líknandi.

## TILTAKSSAMSKIPARI

LONGD **2 ÁR 6 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum tiltakssamskipari fæst tú við at skipa fyri alskyns tiltøkum so sum konsertum, veitslum og brúdleyp-um. Tú ert við til at skapa ta upplivingina, ið kundin ynskir, og myndar tilgongdina at gera hugskot til veruleika.

Undir útbúgvingini verður frálæra eisini givin í ymiskum fyrisitingarligum, eitt nú roknskapi, bók-ingum og sáttmálum.

# SKELTATØKNINGUR

LONGD **3 ÁR 9 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum skeltatøkningur framleiðir tú skelti. Undir útbúgvingini lærir tú um visuelt samskifti, sniðgeving, tilfar og handverk. Tað, tú sniðgevur, skal flytast yvir á t.d. plast og plátur, sum skal skerast út og síðan setast upp.

## ALDURSBÝTIÐ Á LÆRLINGUM




Kelda: yrkisdepilin.fo/hagtoel



# LÆRUPLÁSS EFTIR **ØKI**




Streymoy **523**
Eysturoy **161**
Norðoyggjar **79**
Suðuroy **66**
Vágar **39**
Sandoy **13**

Kelda: yrkisdepilin.fo/hagtoel

# HEILSA, UMSORGAN OG NÁMSFRØÐI

## TANNATSTØÐINGUR

LONGD **3 ÁR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Útbúgvingin sum tannatstøðingur gevur tær grundleggjandi vitan um at ansa eftir tonnum og tannkjøti, og tú lærir um útgerð og tilfar, ið verður nýtt til at fyribyrgja holum og tannsjúkum.

Samstundis lærir tú at taka røntgenmyndir og at finna røttu útgerðina fram til tannlæknan.

Ein partur av arbeiðinum er at passa móttøkuna og telefonina, og eisini at skriva rokningar, skráseta, bíleggja og senda innkallingar til kundar.

# TILFEINGI OG NÁTTÚRA

# HEILSU-HJÁLPARI

LONGD **15 MÐR**
SKÚLAGONGD
**HEILSUSKÚLIN Í SUÐUROY**
STARVSVENJING
**2 UMFØR KRING LANDIÐ**

Sum heilsuhjálpari lærir tú um røkt, umsorgan og stuðul til dagligt virksemi. Tú lærir at taka støði í tørvi, orku og lívssøgu borgarans. Eftir lokna útbúgving kanst tú starvast á ellisheimi, sambýli, heima hjá borgarunum ella á øðrum heilsu fakligum øki, eitt nú sum stuðul í Almannaverkinum. Eisini gevur útbúgvingin atgongd til heilsurøktaraútbúgvingina.

Útbúgvingin byrjar tvær ferðir árliga, í januar og í august.

## Upptøka

Freistir at søkja inn á útbúgvingina sum heilsuhjálpari eru 1. november og 15. mars. Krav er, at tú hevur lokið 10. flokk fólkaskúlans, ella at tú hevur lokið 9. flokk og hevur eitt árs starvsroyndir. Tað er ikki krav, at tað eru starvsroyndir innan røkt.

Sum næmingur á styttri vinnuførleikagevandi útbúgving hevur tú rætt til hægsta útgjald frá Studna, um tú ert eldri enn 18 ár.

### Yrkislærugreinar

- Leiklutur hjálparans
- Møtið við borgaran
- Røkt
- Endurmenning

### Almennar lærugreinar

| | |
|---|---|
| Enskt | C |
| Føroyskt | C |
| Danskt | D |
| Náttúrulæra | D |

*Umframt vallærugreinar*



# ALARI

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **FØROYAR**

Alarar hava ábyrgd av fiski, frá tí hann á smoltstøðini er rogn og yngul, til hann sum smolt verður settur á sjógv í aliringum.

Alarin skal tryggja, at fiskurin verður fóðraður og mennist rætt, og í samráð við leiðsluna av framleiðsluni tryggja, at fiskurin trívist væl, og at aliringurin støðugt er í góðum standi.

Alarin siglur millum land og aliringar í sergjørdum bátum við krana- og fiskaflutningsútgerð.

Aliútbúgvingin er ein samanrenning millum upplæring á læruplássi og undirvísing í skúla.

# DJÓRASJÚKRA-RØKTARI

LONGD **3 ÁR OG 9 MÐR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Sum djórasjúkrarøktari fært tú grundleggjandi vitan um at ansa, røkta og viðgera djór, og tú lærir um atburð, kropsbygnað og sjúkur, soleiðis at metast kann, um djórið er sjúkt.

Eisini lærir tú ymiskt annað, so sum reingerð, kundarøkt og fyrisiting. Djórasjúkrarøktarar arbeiða vanliga hjá djóralæknum.

# GARTNARI

LONGD **3 ÁR 11 MÁNAÐIR**
SKÚLAGONGD **DANMARK**

Ein vakstrarhúsgartnari dyrkar blómur í stórum vakstrarhúsum og ger tær klárar til at selja. Hetta umfatar eitt nú at passa tær á rættan hátt og verja tær ímóti sjúkum og skaðakyktum.

Ein gróðurstøðargartnari dyrkar eitt nú trø og runnar í gróðurstøðum, uttandura urtagørðum ella veltum. Her skalt tú passa vøkstrirnar á rættan hátt og klárgera teir til at selja.

Ein havamiðstøðargartnari arbeiðir í havamiðstøðum, plantuskúlum og øðrum innan plantusølu, og umframt at passa planturnar, arbeiðir viðkomandi við at keypa, selja og marknaðarføra.

# HEILSURØKTARI

LONGD **1 ÁR 10 MÐR**
SKÚLAGONGD
**HEILSUSKÚLIN Í SUÐUROY**
STARVSVENJING
**3 UMFØR KRING LANDIÐ**

Sum heilsurøktari lærir tú m.a. um heilsufremjan, fyribyrging, sjúkrarøkt og endurmenning. Tú fært førleikar at arbeiða innan t.d. eldraøkið, Almanna- og heilsuverkið, psykiatri og sjúkraflutning ella sum stuðul hjá fólki, ið ber eitthvørt brek.

Útbúgvingin byrjar í marsmánaði á hvørjum ári og gevur atgongd til fleiri víðari útbúgvingar.

**Upptøka**

Fyri at søkja krevst heilsuhjálparaútbúgving ella onnur líknandi útbúgving ella miðnámsprógv. Hartil skalt tú hava tríggja mánaða arbeiðsroyndir við viðkomandi arbeiði.

Sum næmingur á styttri vinnuførleikagevandi útbúgving hevur tú rætt til hægsta útgjald frá Studna, um tú ert eldri enn 18 ár.

## Yrkislærugreinar

**Møtið við borgaran/sjúklingin**

**Dygd og menning**

**Borgara- sjúklingagongdin**

**Endurmenning**

**Sálarlig sjúka og sjúkrarøkt**

**Likamlig sjúka og sjúkrarøkt**

**Heilivágslæra**

## Almennar lærugreinar

**Føroyskt A**

**Enskt B**

**Náttúrulæra C**

*Umframt vallærugreinar*

# KLÆDNA-ATSTØÐI

LONGD **2 ÁR**
SKÚLAGONGD **Á GLASI**

Klædnaatstøði er ein grundútbúgving, har tú av sonnum fært høvi at royna tíni skapandi evnir innan mótaverðina. Útbúgvingin er spennandi og kreativ, og tú fært hollan kunnleika innan klædnaframleiðslu.

Arbeitt verður við sniðgeving, seyming, konstruktión og mótasøgu. Sum útbúgvin klædnaatstøðingur hevur tú møguleika at lesa víðari til sniðgeva, klædnahandverkara, ella tú kanst velja at arbeiða á seymistovu ella gerast sjálvstøðugur vinnurekandi.

# TILVIRKISATSTØÐI

LONGD **2 ÁR**
SKÚLAGONGD **Á GLASI**

Tilvirkisatstøði arbeiðir við handverks-traditiónum innan tilfar og tekstil. Her ber til at fáa eina grundvitan innan tekstilhandverk, tilfarsvitan, design. Harumframt lærir tú um møguleikarnar at skapa innan økið.

Á tilvirkisatstøði arbeiðir tú við verkætlanum, har tú lærir at arbeiða við handverkinum, designtólum og skapandi prosessum.

## NÁMSFRØÐIHJÁLPARI

LONGD **2 ÁR**
SKÚLAGONGD **HEILSUSKÚLIN Í SUÐUROY**
STARVSVENJING **KRING LANDIÐ**

Sum námsfrøðihjálpari lærir tú at arbeiða sjálvstøðugt við námsfrøðiligum og umsorganarligum uppgávum. Tú kanst arbeiða innan dagstovna-, skúla- og almannaøkið við mennandi og stimbrandi virksemi, sum styðjar upp undir menningina, trivnaðin og læringina hjá børnum, ungum og vaksnum.

Útbúgvingin gevur atgongd at søkja inn á miðallangar útbúgvingar.

Útbúgvingin byrjar í august hvørt ár.

**Upptøka**
Krav er, at tú hevur lokið 9. flokk fólkaskúlans og hevur eitt árs starvsroyndir ella aðra skúlagongd í eitt ár. Tað er ikki krav, at tað eru starvsroyndir innan námsfrøði.

Sum næmingur á styttri vinnuførleikagevandi útbúgving hevur tú rætt til hægsta útgjald frá Studna, um tú ert eldri enn 18 ár.

### Yrkislærugreinar

- Námsfrøði
- Sálarfrøði í námsfr. verki
- Samskifti í námsfr. verki
- Heilsa í námsfr. verki
- Rørsla og ítróttur
- Náttúra og útilív
- Talgild mentan
- Mentan og virksemi
- Arbeiðsumhvørvi

### Almennar lærugreinar

| | |
|---|---|
| Føroyskt | C |
| Samfelagslæra | C |
| Enskt | C |
| Danskt | C |

*Umframt vallærugreinar*

# SER-BREYT

## SERBREYT

SKÚLAGONGD **Á GLASI, TSK, MIÐNÁMI Á KAMBSDALI OG MIÐNÁMII Í SUÐUROY.**

Á serbreyt eru vanligu upptøkukrøvini til miðnám ikki galdandi, og miðað verður eftir serligum serbreytarprógvi. Undirvísingin á serbreyt verður váttað við prógvi eftir OCN-skipanini. Undirvísingin er bygd á læruætlan, sum er gjørd til tín. Dentur er lagdur á, at tú kemur at klára teg í dagliga lívinum, at læra ymiskt bókmentaligt og/ella listaligt, teldunýtslu og handaligt arbeiði. Tær stendur eisini í boði at menna sosialar, yrkisligar og persónligar førleikar, treytað av tørvi tínum.

Undirvísingin á serbreyt er á Miðnámi á Kambsdali, Glasi. Miðnámi í Suðuroy og Tekniska skúla í Klaksvík.

Vanligu lærugreinarnar eru á tí stigi, sum tú megnar. Undirvísing og hentleikar eru lagað til tørvin hjá tí einstaka. Við einum serbreytarprógvi hevur tú serliga ognað tær førleika at søkja inn á starvsvenjingarstøð, arbeiðspláss ella aðra viðkomandi útbúgving.

# GYMNASIALAR MIÐNÁMSÚTBÚGVINGAR




Tá talan er um upptøku til útbúgvingarnar á gymnasialu breytaskipanini eru Føroyar býttar í tvey upptøkuøki, upptøkuøki **A** og **B**.

Er útbúgvingin, tú ætlar at velja, boðin út í báðum upptøkuøkjum, so skalt tú velja skúlan í tínum upptøkuøki. Verður útbúgvingin einans boðin út á einum stað í landinum, eru allar Føroyar at rokna sum eitt upptøkuøki. Hetta er eitt nú galdandi fyri Tilfeingisbreytina á Miðnámi í Vestmanna og Tøknibreytina á TSK í Klaksvík.

Miðnámsútbúgving er fyrireiking til hægri lestur og hægri útbúgving.

Tí eigur tú at hugsa um, hvørja útbúgving tú ætlar at velja eftir loknan miðnámsskúla, tá tú velur lestrarbreyt á gymnasialum miðnámsskúla.

Í hesum heftinum verða einstøku breytirnar lýstar. Greitt verður somuleiðis frá felagsviðurskiftum, sum eru galdandi fyri næmingar á øllum breytum. T.d. lestrarstuðul, upptøka, møtiskylda, próvtøka og undirvísingartilfar. QR-kodur leinkja til kunningartilfar, ið viðvíkir viðurskiftum, sum eru serlig á skúlanum. T.d. vallærugreinar, hølisviðurskifti, ferðsluviðurskifti og bústaðarmøguleikar.

Breytirnar eru allar bygdar upp eftir sama leisti við kravdum felagslærugreinum, kravdum breytarlærugreinum til ymisku breytirnar, og vallærugreinum, ið tú kanst velja eftir egnum áhuga, tó við serstøkum avmarkingum á teimum einstøku breytunum.

Lærugreinarnar eru flokkaðar í C-, B- og A-stig, har C er lægsta stig, tú kanst náa í eini miðnámsútbúgving, og A er hægsta. Á búskaparbreytini, hugbreytini og náttúrubreytini og tilboðnum innan autismuøkið skalt tú hava í minsta lagi 4 A-stig og 3 B-stig.

Á tilfeingis- og tøknibreytini skalt tú í minsta lagi hava 3 A-stig og 4 B-stig, og á fyrireikingarbreytini skalt tú í minsta lagi hava 2 A-stig og 3 B-stig.

Fyrsta árið í einari gymnasialari útbúgving fylla felagslærugreinarnar nógv á tímatalvuni. 2. og 3. árið taka breytarlærugreinarnar og vallærugreinarnar so líðandi yvir. Nakrir munir eru á, hvussu teir ymisku skúlarnir skipa síni viðurskifti. Les meira um hetta á ymisku heimasíðunum.

### Upptøka og umsóknarfreist

Umsóknarfreistin til allar breytir er 15. mars. Talgilt umsóknarblað er á innskriving.fo. Umsóknarblað at prenta út er at finna á heimasíðuni uvs.fo.

Føroyar eru býttar í tvey upptøkuøki. Øki A og øki B. Upptøkuøki B fevnir um Norðuroyggjar, Eysturoy og tann partin av Sunda kommunu, sum liggur í Streymoynni. Upptøkuøki A er restin av Føroyum.

### Upptøkutreytir

Tú hevur fullført 9. flokk fólkaskúlans ella samsvarandi útbúgving frá øðrum lærustovni, tú hevur lokið kravdu próvtøkurnar við nóg góðum úrsliti, og tú evnar at fylgja undirvísingini á nøktandi hátt.

Lýkur tú ikki hesar treytir, kann einstaki skúlin gera eina ítøkiliga meting og taka støðu út frá henni. Serstakar upptøkutreytir eru í nøkrum førum til einstøku breytirnar.

Fyri at verða upptikin á náttúrubreytina, tilfeingisbreytina og tøknibreytina, skalt tú hava fingið undirvísing í minsta lagi 2 ár í alis-/evnafrøði.

Fyri at velja ávíst framhaldsmál á hugbreytini og búskaparbreytini, skalt tú hava fingið undirvísing í minsta lagi 2 ár í hesum máli.

Fyri at søkja inn á fyrireikingarbreytina, skalt tú hava fylt 18 ár í seinasta lagi 31. desember tað árið, undirvísingin byrjar.

Við FHS-prógvi ber til at søkja inn á 2. árið á búskaparbreytini.

### Hægri lestur

Eitt prógv frá einari gymnasialari útbúgving í Føroyum gevur atgongd til styttri og longri framhaldsútbúgvingar, bæði í Føroyum og uttanlands; tó við teimum avmarkingum, sum tær einstøku útbúgvingarnar seta, t.d. um ávísar lærugreinar á ávísum stigi.

### Stuðul

Sum næmingur á eini gymnasialari miðnámsútbúgving hevur tú rætt til lestrarstuðul frá Studna, um tú er eldri enn 18 ár.

Ert tú undir 18 ár, fært tú ikki lestrarstuðul, men kanst fáa stuðul til keyp av undirvísingartilfari. Tú søkir um stuðul, tá tú byrjar útbúgvingina.

Fá meira kunning á studni.fo

# BÚSKAPARBREYT

LONGD **3 ÁR**
SKÚLAGONGD
**MIÐNÁM Í SUÐUROY,
Á GLASI OG
Á KAMBSDALI**

Á búskaparbreytini verður dentur lagdur á búskaparlig og samfelagslig evni innan eitt nú roknskap, marknaðarføring og samfelagsbúskap. Eisini verður dentur lagdur á mál og altjóða viðurskifti.

Undirvísingin á búskaparbreytini er lutvíst vanlig floksundirvísing, men eisini bólkaarbeiði og verkætlanararbeiði. Tú fært møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum. Námsferðir, virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttan fyri skúlan og skúlatíðina eru somuleiðis vanligar.

### Vallærugreinar

Á búskaparbreytini eru vallærugreinar, sum teir tríggir miðnámsskúlarnir skipa eftir ymiskum leisti. Til ber at lesa meira um hetta á heimasíðunum hjá einstøku skúlunum. Felags er, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

Til ber at søkja inn á 2. árið á búskaparbreytini við FHS-prógvi.

**Felags- og breytarlærugreinar**

| | |
|---|---|
| Føroyskt | A |
| Enskt | B |
| Altjóða búskapur | B |
| Søga | B |
| Sølubúskapur | B |
| Virkisbúskapur | B |
| ítróttur og heilsa | C |
| Samfelagsfrøði | C |
| Støddfrøði | C |
| Vinnurættur | C |

### Framtíðarmøguleikar

Búskaparbreytin gevur tær møguleika at søkja um upptøku á øllum hægri lærustovnum.

Tær lærugreinar og tey lærugreinastig, tú velur, kunnu ávirka tínar møguleikar at koma beinleiðis inn á einstakar útbúgvingar. Tí er umráðandi at kunna teg um hesi viðurskifti, áðrenn tú velur vallærugreinar og lærugreinastig.

Útbúgvingin hevur sum mál at fyrireika teg til hægri lestur á handilsháskúla, universiteti og øðrum hægri lærustovnum, og kann við fyrimuni verða brúkt í sambandi við eina yrkisútbúgving innan merkantila økið.

# HUGBREYT

LONGD: **3 ÁR**
SKÚLAGONGD
**MIÐNÁM Í SUÐUROY,**
**Á GLASI OG**
**Á KAMBSDALI**

Á hugbreytini verður dentur lagdur á málslig og hugvísindalig evni. Eisini verður dentur lagdur á almennandi evni so sum skapandi lærugreinar og náttúrulærugreinar.

Undirvísingin á hugbreytini er lutvíst vanlig floksundirvísing, men eisini bólkaarbeiði og verkætlanararbeiði. Tú fært møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum.

Námsferðir, virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttan fyri skúlan og skúlatíðina eru somuleiðis vanligar.

## Vallærugreinar

Á hugbreytini eru vallærugreinar, sum teir tríggir miðnámsskúlarnir skipa eftir ymiskum leisti. Til ber at lesa meira um hetta á heimasíðunum hjá einstøku skúlunum. Felags er, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

## Upptøkutreyt

Treyt fyri upptøku á hugbreyt er at tú hevur tikið týskt sum lærugrein í fólkaskúlanum.

## Framtíðarmøguleikar

Hugbreytin gevur tær møguleika at søkja inn á allar hægri framhaldsútbúgvingar, tó við teimum avmarkingum, sum framhaldsútbúgvingarnar seta viðvíkjandi lærugreinum og lærugreinastigum.

Útbúgvingin hevur serliga sum mál at fyrireika teg til tær hugvísindaligu framhaldsútbúgvingarnar.

## Felags- og breytarlærugreinar

| | |
|---|---|
| Føroyskt | A |
| Søga | A |
| Enskt | B |
| Ítróttur og heilsa | C |
| Landafrøði | C |
| Lívfrøði | C |
| Religión | C |
| Samfelagsfrøði | C |
| Støddfrøði | C |

# NÁTTÚRUBREYT

LONGD: **3 ÁR**
SKÚLAGONGD **MIÐNÁM Í SUÐUROY, Á GLASI OG Á KAMBSDALI**

Á náttúrubreytini verður dentur lagdur á náttúruvísindalig evni. Eisini verður dentur lagdur á almennandi evni so sum skapandi lærugreinar og mállærugreinar.

Undirvísingin á náttúrubreytini er lutvíst vanlig floksundirvísing, men eisini bólkaarbeiði og verkætlanararbeiði. Tú fært møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum.

Námsferðir, virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttan fyri skúlan og skúlatíðina eru somuleiðis vanligar.

## Vallærugreinar

Á náttúrubreytini eru vallærugreinar, sum teir tríggir miðnámsskúlarnir skipa eftir ymiskum leisti.

Til ber at lesa meira um hetta á heimasíðunum hjá einstøku skúlunum. Felags er, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

## Framtíðarmøguleikar

Náttúrubreytin gevur tær møguleika at søkja inn á allar hægri framhaldsútbúgvingar, tó við teimum avmarkingum, sum framhaldsútbúgvingarnar seta viðvíkjandi lærugreinum og lærugreinastigum.

Útbúgvingin hevur serliga sum mál at fyrireika teg til tær náttúruvísindaligu framhaldsútbúgvingarnar.

## Felags- og breytarlærugreinar

| | |
|---|---|
| Føroyskt | A |
| Søga | A |
| Alisfrøði | B |
| Enskt | B |
| Støddfrøði | B |
| Evnafrøði | C |
| ítróttur og heilsa | C |
| Landafrøði | C |
| Lívfrøði | C |
| Religión | C |
| Samfelagsfrøði | C |

# TILFEINGISBREYT

LONGD: **3 ÁR**
SKÚLAGONGD **Í VESTMANNA**

Á tilfeingisbreytini verður dentur lagdur á náttúruvísindalig evni. Breytin fevnir eisini um málslig, hugvísindalig og samfelagslig evni.

Tilfeingisbreytin er serliga ætlað teimum, sum hava áhugað fyri náttúru, náttúrutilfeingi, umhvørvi og burðardygd. Tískil er talan um eina grøna breyt.

Undirvísingin á tilfeingisbreytini er lutvíst vanlig floksundirvísing, starvsstovuarbeiði, bólkaarbeiðið og verkætlanararbeiði v.m.

Vitjað verður á stovnum og virkjum. Kanningar og royndir verða gjørdar úti í náttúruni. Námsferðir eru partur av undirvísingini.

Tvær lærugreinir eru, sum ikki finnast á øðrum breytum. Tann fyrra er *tilfeingisfrøði B*, sum skal geva næmingunum grundleggjandi vitan um tey ymsu sløgini av livandi verum í føroysku náttúruni, og um skynsama gagnnýtslu av náttúrutilfeinginum. Hin er *tilfeingi A*, har næmingarnir arbeiða við trimum verkætlanum triðja skúlaárið. Verkætlanir kunnu gerast innan hesi øki: Náttúrutilfeingi, aling, landbúnað, fiskiskap og veiðu, framleiðslu og náttúrunýtslu.

## Vallærugreinar

Á tilfeingisbreytini skal næmingurin velja nakrar vallærugreinar. Tá hesar verða valdar, er ein treyt, at ein teirra skal lyfta eina felagslærugrein ella breytarlærugrein frá B til A. Hetta tryggjar, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

## Framtíðarmøguleikar

Tilfeingisbreytin gevur tær møguleika at lesa náttúrufrøðiligar lærugreinar sum lívfrøði, tilfeingisfrøði, umhvørvisvísindi og umhvørvisbúskap. Men til ber eisini at velja aðra útbúgvingarleið eins og á hinum breytunum, tó við teimum avmarkingum, sum framhaldsútbúgvingar seta viðvíkjandi lærugreinum og lærugreinastigum. Við próvnum kanst tú eisini skapa tær eina framtíð sum t.d. náttúruvegleiðari, lívfrøðiatstøðingur ella íverksetari.

**Felags- og breytarlærugreinar**

| | |
|---|---|
| Føroyskt | A |
| Tilfeingi | A |
| Enskt | B |
| Evnafrøði | B |
| Lívfrøði | B |
| Støddfrøði | B |
| Tilfeingisfrøði | B |
| Søga | C |
| Alisfrøði | C |
| ítróttur og heilsa | C |
| Samfelagsfrøði | C |
| Samskiftistøkni | C |

# TØKNIBREYT

LONGD **3 ÁR**
SKÚLAGONGD
**Á TSK Í KLAKSVÍK**

Á tøknibreytini verður dentur lagdur á náttúruvísindaligu lærugreinarnar støddfrøði, tøkni, alisfrøði, lívfrøði og evnafrøði.

Undirvísingin er í stóran mun skipað sum verkætlanir og fer fram á starvsstovum og verkstøðum, har tú í stóran mun roynir skúlalærdóm í verki.

Námsferðir, virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttan fyri skúlan og skúlatíðina eru somuleiðis vanligar.

## Vallærugreinar

Á tøknibreytini skal næmingurin velja nakrar vallærugreinar. Tá hesar verða valdar, er ein treyt at ein teirra skal lyfta eina felagslærugrein ella breytarlærugrein frá B til A. Hetta tryggjar, at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

## Framtíðarmøguleikar

Við einum prógvi frá tøknibreytini eru fjølbroyttir møguleikar – alt eftir hvørjar lærugreinar, tú velur. Tøknibreytin vendir sær serliga til tey, sum ætla sær undir eina tøkniliga ella náttúruvísindaliga útbúgving sum t.d. verkfrøði. Annars ber til við einum prógvi frá tøknibreytini at søkja inn á allar hægri framhaldsútbúgvingar, tó við teimum avmarkingum, sum útbúgvingarstovnarnir seta um ávísar lærugreinar á ávísum stigi.

### Felags- og breytarlærugreinar

| | |
|---|---|
| Føroyskt | A |
| Tøkni | A |
| Alisfrøði | B |
| Enskt | B |
| Evnafrøði | B |
| Støddfrøði | B |
| Tøknifrøði | B |
| Ítróttur og heilsa | C |
| Lívfrøði | C |
| Samfelagsfrøði | C |
| Samskiftistøkni | C |
| Søga | C |

# FYRIREIKINGARBREYT

LONGD: **2 ÁR**
SKÚLAGONGD **Á TSK Í KLAKSVÍK, Á GLASI OG Á MIÐNÁMI Á KAMBSDALI**

Fyrireikingarbeytin er ein almennandi og lestrarfyrireikandi útbúgving, ið fevnir breitt um fleiri evni.

Á fyrireikingarbreytini er nógv vanlig floksundirvísing, men eisini bólkaarbeiði og verkætlanararbeiði. Eisini er møguleiki at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum.

Útbúgvingin er serliga ætlað tilkomnum, sum hava havt ein steðg frá skúlanum, men ætla sær víðari á eina styttri ella miðallanga útbúgving. Námsferðir, virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttanfyri skúlan og skúlatíðina eru somuleiðis vanligar.

### Vallærugreinar

Á fyrireikingarbreytini skalt tú velja vallærugreinar, soleiðis at samlaða lærugreinasamansetingin í próvnum er í samsvari við endamálið hjá breytini.

### Framtíðarmøguleikar

Útbúgvingin gevur atgongd at søkja inn á hægri lærustovnar. At útbúgvingin, ið tekur tvey ár, í fleiri lærugreinum endar við lægri stigi enn á útbúgvingum, ið taka trý ár, kann hava ávísar avmarkingar við sær. Fyri at koma inn á ávísar hægri framhaldsútbúgvingar, noyðist tú at taka eina ella fleiri lærugreinar á hægri stigi.

**Felags- og breytarlærugreinar**

| | |
|---|---|
| Føroyskt | A |
| Søga | A |
| Enskt | B |
| Ítróttur og heilsa | C |
| Religión | C |
| Samfelagsfrøði | C |
| Støddfrøði | C |

# SKAPANDI FYRIREIKINGARBREYT

LONGD **3 ÁR**
SKÚLAGONGD **GLASIR**

Glasir bjóðar eina skapandi fyrireikingarbreyt, sum svarar til fult fyrireikingarprógv, við møguleika at velja eitt eyka A-stig. Bókligar lærugreinar verða samantvinnaðar við kreativar og yrkisfakligar lærugreinar. Eitt tvørfakligt samstarv millum gymnasialar og yrkisrættaðar lærugreinar, serliga innan tilvirkis- og klædnaatstøði.

### Framtíðarmøguleikar

Umframt at geva somu møguleikar sum fyrireikingarbreytin, hevur skapandi fyrireikingarbreytin eitt eyka A-stig og nakrar kreativar lærugreinar, ið kunnu geva fleiri valmøguleikar til víðari útbúgving.

# FHS

LONGD **1 ÁR**
SKÚLAGONGD **Á MIÐNÁMI Á KAMBSDALI, Á GLASI OG Á MIÐNÁMI Í SUÐUROY**

FHS er eitt árs grundútbúgving innan fyrisiting, handil og skrivstovu, har dentur verður lagdur á handilslig og samfelagslig evni, so sum roknskap, marknaðarføring og samfelagsfak.

Eisini verður dentur lagdur á mál og kunningartøkni, og tú fært møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum.

FHS kann takast sum partur av einari yrkisútbúgving innan fyrisiting, handil og skrivstovu.

FHS er ein føroysk útbúgving sum einans gevur atgongd til handils- og skrivstovuútbúgvingar í Føroyum, og til útbúgvingar innan Handel og Detail í Danmark.

Virkisvitjanir og smærri verkætlanir uttan fyri skúlan og skúlatíðina eru vanlig á FHS.

### Framtíðarmøguleikar

Við einum FHS-prógvi kanst tú fara í læru á skrivstovu ella í handli, og tekur tú útbúgvingina í Føroyum, fært tú stytt lærutíðina við einum ári. Velur tú eina útbúgving til skrivstovu við sergrein, er skúlagongdin í Danmark og tá er ein miðnámsútbúgving partur av útbúgvingartíðini og tað kann merkja, at tú ikki fært stytt lærutíðina. Velur tú eina útbúgving til sølu við sergrein, er skúlagongdin eisini í Danmark og útbúgvingarlongdin 2 ár og 6 mánaðir. Tá er kravið einans 5 fak á C-stigi, og tú fært stytt lærutíðina við 6 mánaðum, um tú hevur tikið FHS frammanundan. Meir kann lesast um krøvini undir sjálvari yrkisútbúgvingini.

Velur tú at halda áfram á búskaparbreyt á 2. ári, tá tú hevur lokið FHS, eru ávís krøv um lærugreinar á C-stigi, og tað er leiðari skúlans, sum metir um útbúgvingina, sum tú nýtir sum upptøkugrundarlag. Um mett verður, at tú hevur fortreytir svarandi til C-stigsførleika í lærugreinunum fyrsta árið, og annars er før/ur fyri at fylgja undirvísingini á nøktandi hátt, kann umsóknin verða gingin á møti.

Tú eigur at vita, at onkrar avmarkingar eru við FHS-próvnum, um tú fert av landinum at útbúgva teg víðari, t.d. innan skrivstovu í Danmark. Kanna tí hetta fyrst, um tað er tín ætlan at útbúgva teg víðari uttanlands.

# SERFLOKKUR INNAN AUTISMUØKIÐ

LONGD **4 ÁR**
SKÚLAGONGD **Á GLASI**

Serflokkur innan autismuøkið er ætlaður ungum, sum hava tørv á serliga skipaðum skúlatilboðum, har stuðulsfyriskipanir eru í og, um neyðugt, eftir skúlatíð. Vanligu upptøkukrøvini til miðnám eru galdandi fyri serflokkin. Eyðkenni við serflokkinum eru, at floksundirvísingin er serliga skipað og fer fram í flokki við fáum næmingum. Bólkaarbeiði og verkætlanararbeiði eru eisini partur av gerandisdegnum. Í serflokki fært tú eisini møguleika at arbeiða sjálvstøðugt við størri uppgávum. Námsferðir, vitjanir og smærri verkætlanir uttan fyri skúlan eru somuleiðis vanligar.

Serflokkurin hevur eina felags breyt. Í serflokkinum skal næmingurin velja nakrar vallærugreinar. Hesar verða valdar eftir ávísum treytum fyri at tryggja, at prógvið uppfyllir formligu krøvini á breytini.

### Framtíðarmøguleikar

Við einum prógvi frá serflokki hevur tú ognað tær førleika at søkja inn á ymsar hægri lærustovnar, alt eftir hvørjar lærugreinar eru og verða valdar. Eitt gymnasialt prógv innan autismuøkið hevur sama virði sum prógv frá hinum útbúgvingunum í gymnasialu breytaskipanini. Einasti munurin er, at talan er um 4 ára útbúgving.

### Upptøka

Upptøka til serflokk innan autismuøkið er annaðhvørt ár. Eingin upptøka var í 2023. Upptøka til serflokk innan autismuøkið á Glasi verður tískil aftur í 2024.

## STAKGREINA-LESTUR

LONGD **UPP TIL 3 ÁR**
SKÚLAGONGD **Á ØLLUM MIÐNÁMSSKÚLUM**

Fyri at verða tikin upp sum stakgreinalesandi skalt tú hava fylt 18 ár í seinasta lagi 31. desember í tí skúlaári, undirvísingin byrjar, og tú skalt lúka fakligu fortreytirnar í lærugreinunum, sum tú innskrivar teg til. Innskrivingin fer fram á innskriving.fo.

Tú skalt venda tær til tann skúlan, har tú ynskir at fylgja undirvísingini, og tosa við lestrarvegleiðara um upptøku. Stakgreinalesandi verða tikin upp, um pláss er. Seinasta freist at innskriva seg sum stakgreinalesandi er 25. juni í tí ári, tú ynskir at byrja undirvísingina.

## SJÁLVLESTUR

LONGD **UPP TIL 3 ÁR**
SKÚLAGONGD **Á ØLLUM MIÐNÁMSSKÚLUM**

Tað ber til sum sjálvlesandi at fyrireika seg til gymnasiala miðnámsskúlaprótøku. Í hesum føri skalt tú tosa við lestrarvegleiðara á skúlanum, har tú ætlar at fara til próvtøku, m.a. fyri at fáa kunning um próvtøkukrøv, pensumkrøv og fakliga innihaldið í lærugreinunum.

Í lærugreinunum alisfrøði, evnafrøði, ítrótti og lívfrøði skalt tú hava fylgt starvsstovuskeiðunum í lærugreinini, sum tú ætlar tær til próvtøku í. Innskriving til próvtøku sum sjálvlesandi fer fram í seinasta lagi 15. mars í tí skúla, har tú ynskir at fara til próvtøku. Lýst verður fyrst í februarmánaði um innskrivingarfreist.

# AÐRAR ÚTBÚGV-INGAR

## SKIPSATSTØÐARI

LONGD **1 ÁR**
SKÚLAGONGD **SJÓNÁM**

Hevur tú hug til sjógvin og gott handalag, so býr kanska ein lítil skipsatstøðari í tær. Á hesi útbúgving fert tú at fáast við alt frá maskin- og smiðjulæru til tað teoretiska so sum siglingarfrøði, veðurlæru, el, hydraulikk og trygd á sjónum. Tú fært eisini nøkur skeið við í viðførið, eitt nú trygdarskeið, bátaføraraskeið og roykkavaraskeið.

Yvirhøvur er hetta ein bóklig og handalig útbúgving, sum brynjar teg til lívið á sjónum, umframt at tú fært eitt sterkt grundarlag til víðari lestur. Við einari skipsatstøðaraútbúgving verður kravið um siglingartíð minkað niður í eina helvt í sambandi við upptøku til skiparaútbúgving.

Treytir fyri upptøku er, at tú hevur staðið fráfaringarroynd fólkaskúlans, hava galdandi heilsuváttan (bláu bók) uttan avmarkingar, so tú eisini egnar teg til kagtænastu.

Tú kanst søkja beinleiðis á heimasíðuni sjonam.fo.

Eisini er møguligt at senda umsóknina (saman við avriti av prógvum, heilsuváttan, sjófartsbók og navnaella dópsbrævi) við postinum ella sum teldupost: sjonam@sjonam.fo
Freistin at søkja er 1 vika fyri skúlabyrjan. Skúlin byrjar eftir summarfrítíðina (í august) á hvørjum ári. Tú fært vanligan lestrarstuðul frá Studna. Sjálvlestur letur seg ikki gera.

## MUSIKKSKÚLA-MIÐNÁM

LONGD **3 ÁR**
SKÚLAGONGD
**TÓRSHAVNAR MUSIKKSKÚLI**

Føroyska musikkskúla-miðnámsútbúgvingin er ein 3 ára tónleikaútbúgving, ið hevur til endamáls at geva framkomnum næmingum eitt skipað undirvísingartilboð á miðnámsstigi.

Miðnámsstig liggur millum vanligan musikkskúla og musikkonservatorium.

Málini eru, at fyrireika evnaríkar næmingar til nám á hægri tónlistaskúla, og lutvíst at nøkta tørvin á einari hollari útbúgving til áhugaleikarar.

Útbúgvingin er fyri næmingar úr øllum landinum í aldrinum 14–25 ár – bæði klassiskt og rytmiskt.

Tórshavnar Musikkskúli leggur miðnámið til rættis, og mest sum øll undirvísing fer fram í Havn.

Bert næmingar, ið kunnu metast at standa eina upptøkuroynd á musikkkonservatorii eftir 3 ára miðnám, verða upptikinir. Hvørt skúlaár verða í mesta lagi 8 tikin inn.

Námið endar við próvtøku, og royndir verða hildnar á hvørjum ári.

Næmingurin rindar kommunala musikkskúlanum eitt gjald. Í løtuni er árliga gjaldið kr 2.400 í Tórshavnar Musikkskúla.

Vikutímatalið hjá næminginum er umleið 9 tímar. Hugsanin er, at til ber at røkja annan skúla samstundis – ella at hava annað arbeiði við síðuna av.

Umframt høvuðsljóðføri ella høvuðslærugrein, kunnu teori, hoyrilæra, musikksøga, kamartónleikur og improvisatión vera kravdar hjálærugreinir. Klaver er hjálærugrein hjá teimum flestu.

Teori, kompositión, sangskriving, tónleikaframleiðsla og hoyrilæra kunnu vera høvuðslærugreinir.

# FRAMHALDS-ÚTBÚGVINGAR Í FØROYUM

Umframt tær útbúgvingar, ið eru nevndar í hesum kunningarfaldara, er at nevna tær framhaldsútbúgvingar, sum tú hevur møguleika at taka í Føroyum. Til hesar útbúgvingar krevst, at tú hevur verkligar royndir ella útbúgving á miðnámsstigi ella eina yrkisútbúgving fyri at verða upptikin. Ikki allar útbúgvingar verða bodnar út á hvørjum ári.

## VINNUHÁSKÚLIN

Á Vinnuháskúlanum í Havn kanst tú taka aspirantútbúgving, skipara-, skipsførara- og maskinmeistaraútbúgving. Hesar útbúgvingar krevja, at tú í minsta lagi hevur verkligar royndir, so sum siglingstíð, miðnámsprógv, ella eina viðkomandi yrkisútbúgving.

Meira kunning er á heimasíðuni www.vh.fo

## SJÓNÁM

Á Sjónámi í Klaksvík kanst tú taka skiparaútbúgving. Hon krevur, at tú hevur 9. ella 10. floksprógv, umframt at tú hevur kravda siglingstíð.

Meira kunning er á heimasíðuni www.sjonam.fo/skipari

## HÆGRI NÁM Á GLASI

Á Glasi kanst tú velja ímillum fleiri styttri framhaldsútbúgvingar, so sum tænastubúskap, marknaðarførslubúskap, innovatión og íverksetan, HD, framleiðslutøkning, fíggjarbúskap, byggifrøði, diplomútbúgving í leiðslu og akademiútbúgving.

Meira kunning um hesar útbúgvingar er á heimasíðuni www.glasir.fo/breytir (Hægri nám)

## HÆGRI ÚTBÚGVINGAR Á FRÓÐSKAPARSETRI FØROYA

Á Setrinum kanst tú velja ímillum fleiri útbúgvingar á hægri stigi. Á Setrinum eru fimm deildir, sum bjóða eitt fjølbroytt úrval av útbúgvingum, umframt ymisk stakskeið.

Á Føroyamálsdeildini kanst tú lesa føroyskt mál og bókmentir á BA- og MA-stigi, umframt BA í listarligum arbeiði.

Á Námsvísindadeildini kanst tú lesa til lærara og námsfrøðing á BA-stigi.

Á Náttúruvísindadeildini kanst tú velja ímillum fleiri ymiskar náttúruvísindaligar útbúgvingar á B.Sc.-stigi, sum t.d. KT-verkfrøði, orkuverkfrøði, lívfrøði o.fl.

Á Søgu- og samfelagsdeildini kanst tú lesa B.A. í søgu, løgfrøði, politikki, samfelagsvísindum o.fl., umframt M.A. í løgfrøði og í leiðslu og skipan.

Á deildini fyri heilsu- og sjúkrarøktarvísindi kanst tú lesa B.Sc. í sjúkrarøktarfrøði og M.Sc. í heilsuvísindum.

Meira kunning um hesar útbúgvingar er á heimasíðuni www.setur.fo




**vegleiding.fo**

**yrkisdepilin.fo**

# FØROYSKA ÚTBÚGVINGARSKIPANIN

Yvirlitið vísir útbúgvingargongdina frá fólkaskúla til hægri útbúgvingar. Punkteraðu strikurnar gera vart við, at møguliga er neyðugt at taka ískoytis lærugreinar, so at ávísar treytir fyri upptøku til framhaldslestur skulu vera uppfyltar.

Hevur tú spurningar ella ivast í onkrum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við lestrarvegleiðingina á skúlunum, har útbúgvingin verður boðin, ella venda tær til Vegleiðingarstovuna ella til Yrkisdepilin.

©NUDLAVIRKIÐ